# Yvir Um Hav...

Tað er so kalt, bonkurin er so harður, tá eg sleppi at sita. Vatnið skvatlar rundanum bátin, tað er endiliga blivið gott veður aftur eftir eina langa viku við illveðri. Eg fái ikki flutt meg, her er so trongt, eg leni meg ímóti mammu, hon er so kløn og køld. Mamma.

*Eg leni meg ímóti mammu, hon er so fjálg og heit, hon turkar tárini av reyða kjálkanum hjá mær og leggur eitt plástur á skurslaða knæið, Eg eri dottin av súkkluni, sum eg fekk í føðingardagsgávu, tá eg bleiv 7 ár.*

Hon tekur um meg, hon turkar tárið av klæna, kalda kjálkanum hjá mær og sigur at alt fer at ganga. Eg hyggi yvir at líttlabeiggja mínum, hann hevur fingið tørn at sita á bonkinum, eyguni eru tóm, og møðin sæst sera væl á honum.

*Líttlibeiggin hjá mær er júst byrjaður í skúlanum, eg síggi hann renna í skúlagarðinum saman við sínum vinmonnum, tað skínir av gleði í eygum hansara. Framtíð hansara sær ljós út, hann dugir longu at lesa og er sera skilagóður.*

Beiggi mín var einaferð ikki tann yngsti sum var við umborð. Gamla lærarindan hjá okkum, frú Kishka, sum hevði havt okkum í handaverk og list, hevði ein lítlan son, sum bert var fýra ára gamal. Plask, soleiðis ljóðar tað, eftir at onkur er deyður, "Tey brúka bara óneyguða nógv pláss" siga tey. Er tað tað einasta tey fáa? Eg minnist, tá ið vit vóru til jarðarferð hjá ommu míni, tá var sera nógv gjørt burturúr, og vit gróvu hana undir moldina. Plask.

*Plask, plask og eitt plask afturat, eg og vininir eru við dunnuhylin í viðarlundini og blaka teir størstu steinarnar, vit kunnu finna, fyri at gera tað størsta plaskið sum møguligt. Vit síggja frú Kishku koma vaggandi ímóti okkum við tí stóra búkinum, gu'vidi um hon fær ein son ella eina dóttir. Genturnar í flokkinum vóna eina dóttir, men dreingirnir hugsa tað øvuta. Tá hon at enda kemur fram til okkum, biður hon okkum steðga við at kasta steinar, tí tað oyðileggur tann flotta dunnuhylin.*

*Frú Kishka er tann fittasta lærarindan, sum vit hava í skúlanum, hon er altíð so glað, og hevur altíð nýggjar og spennandi søgur at fortelja okkum, um hvussu hon hevur ferðast runt heimin. Tá eg verði eldri, fari eg at ferðast líka ofta sum hon.*

Hetta er mín fyrsta ferð út í heim. Eg visti ikki, at ferðin fór at vera so drúgv og long. Tað er ikki nógv at gera umborð, eg og beiggi mín eru tey einastu børnini, sum eru eftir, so her er eingin at spæla við, men eg eri kanska blivin ov gomul til at spæla. Vit kunnu heldur ikki tosa við tey vaksnu, tí tey práta bert um sovorðið, sum børn ikki skilja, um tey nú yvirhøvur tosa saman.

Eg hosti. Mamma hyggur bangin at mær, hon leggur eina hond á pannuna hjá mær og hyggur syrgin at konuni, sum stendur beint við. Eg skilji ikki, hvat tað merkir, men eg eri blivin sera móð, og eg leggi meg niður, tí nú er pláss til tað. Eg sovi teir flestu daganir, tí eg orki ikki at verða vakin. Tað keðiligasta við tí er, at eg fái marruna hvørja ferð. Tað er nógv at minnast aftur á, og tað er ikki gott.

*"Góðu, royni og fái eitt sindur av svøvni" sigur mamma, meðan hon situr og klemmar meg og beiggja mín. Hetta er triðja náttin á rað, at vit hava verið noydd úr heiminum hjá okkum niður í kalda og myrka bumbuskýlið at krógva okkum. Eg blundi, men eg fái ikki sovið fyri øllum ganginum, sum er uttanfyri. Mamma murrar eitt lag fyri at sissa beiggja mín, eg kenni sangin aftur. Hon og pápi plagdu*

*at sita við klaveri og syngja um kvøldarnar, tá tey høvdu lagt okkum at sova, og hendan sangin sungu tey hvørja ferð. Nú eru tvey ár liðin, síðani pápi fór í herin, hann vildi ikki fara, men hann skuldi, tað skuldu øll mannfólk, sum vóru eldri enn 18 ár, systkinabarn okkara var júst blivin 18 ein mánað fyri, at kríggið breyt út. Eg murri lagið saman við mammu, hon kroystir meg eitt sindur meira og kelar hárið á mær. Við eitt slær ein gomul kona stavin eftir mammu og mær, hon biður okkum tiga, og hon kallar okkum eisini eina rúgvu av ljótum orðum, sum mamma ikki lovar mær at brúka.*

Náturnar eru kaldar og dagarnir skiftandi, onkrir turrir og onkrir vátir. Eg leni meg inn at mammu, tað er óvanliga gott pláss umborð nú. Eg hoyri mammu tosa við eina aðra konu umborð, tær tosa sera spakmælt, okkurt við at tað eru ov nógvir munnar, og at føðin røkkur ikki til. Eg skilji ikki ordiliga, hvat tær meina við. Eg vakni aftur, nú er tað ljóst. Eg orki næstan ikki at lata eyguni upp, men eg merki, at tað er ein heitur dagur. Konan, sum mamma tosaði við í nátt sigur, at hon sær land. Tað er nú, tað er hetta vit hava bíða so leingi eftir. Eg klári akkurát at fáa eyguni nóg opin til, at eg síggi, at har er ikki eitt skýggj at hóma. Eg blundi aftur og eg smílist fyri meg sjálva. Mamma gevur mær ein koss á kjálkan. Vit fara at sleppa í land ein heitan og turran dag. Eg føli onkran lyfta meg upp, vit mugu vera komin fram, vit eru bjargað. Við eitt gerist eg dýggjvát og ísakøld, eg skilji einki. Regnar tað? Er sandurin vátur? Eg hoyri skvatlið á bátinum gerast fjarari og fjarari. Tað síðsta eg hoyri, áðrenn alt gerst kvirt, er ein syrgin kvinnugrátur. Tað ljóðar sum røddin á mammu. Eg søkki longur og longur niður í myrkrið.